# Nú verður bannað at sláa børn



Børnini í Føroyum ver›a nú vard móti "varisligari likamligari revsing", ið var bannað í hinum norðurlondunum fyri mongum árum síðani.

**Rætturin at sláa børn varð avtikin í tinginum í dag.**

BØRN OG UNG
*Rigmor Dam*
*rigmor@sosialurin.fo*

Orðaskiftið um at avtaka rættin til at sláa børn hevur verið uppi við jøvnum millumbili. Tá hevur lítið talað fyri, at meiriluti fór at vera fyri at taka undir við at taka av sonevnda revsirættin, tí, sum tikið varð til: ongin tekur skaða av at fáa ein undir vangan.

**Forboðið hekk uppií**
Kortini verður forboðið, sum hevur verið galdandi í grannalondunum í nógv ár, nú eisini galdandi í Føroyum. Hetta kanska meira av tilvild, tí forboðið móti likamligari revsing móti børnum er partur av ríkislógartilmæli um foreldramynduleika - "lov om forældremyndighed og samvær", sum eitt samt Løgting atkvøddi fyri mikudagin, tá uppskotið var til 2. viðgerð. Sambært uppskotsstillaranum, Jacob Vestergaard, landsstýrismann í Innlendismálum, er hetta ein liður í arbeiðinum at dagføra aldargomlu lóggávuna um viðurskiftini millum foreldur og børn, og at fáa eina tíðarhóskandi lóggávu á økinum. Hann skjýtur upp, at nýggja lógin kemur í gildi 1. apríl 2007.

Lógin, sum hevur verið galdandi var upprunaliga frá 1922, Lov om Umyndighed og Værgemaal. Seinastu broytingarnar eru frá 1978, og tær vórðu settar í gildi í Føroyum í 1982.

**Var frammi í 2003**
Eitt líknandi uppskot var lagt fram fyri knøppum 4 árum síðani, tá Katrin Dahl Jakobsen úr Javnaðarflokkinum legði uppskot fyri tingið um at avtaka rættin til likamliga at revsa børn. Katrin Dahl Jakobsen tók tá uppskotið aftur, tí danska løgmálaráðið metti onga heimild vera fyri at seta bert ein part av lógini um foreldramyndugleika í gildi. Men uppskotið var til viðgerðar í tinginum, og røktist sum sagt lítið fyri, at uppskotið fór at verða samtykt.

**Sum grannalondini**
Í viðmerkingunum til ríkislógartilmæli, sum løgtingið atkvøddi fyri mikudagin, vóru viðmerkingarnar hjá Katrin Dahl Jakobsen, frá februar 2003 endurgivnar. Har stóð eitt nú, at:

Galdandi lóggáva í Føroyum heimilar í ávísan mun varisliga likamliga revsing móti egnum børnum... Og at tað er rætt at fylgja hinum norðurlondunum í hesum málinum og hava eins reglur galdandi, tá tað snýr seg um revsing av børnum, eins og Norðurlandaráðið mælti til í 1982. Í Svøríki settu tey úr gildi rættin til likamliga revsing av egnum børnum í 1979, í Finnlandi í 1983 og í Noregi í 1987.

Katrin Dahl Jakobsen, segði tá, at rætturin til likamliga revsing av børnum er tikin av í okkara granalondum er eitt nú úrslit av broyttum hugburði til uppaling og av støðugari upplýsing um, hvørjar umstøður skulu til, fyri at børn kunnu mennast og klára seg í lívinum. Verða børn ald upp í harðskapi, er sannlíkt, at harðskapur gerst teirra fremsta amboð, tá tey sjálvi koma í truplar støður. Øvugt hava royndir millum annað í Svøríki víst, at slík lógarbroyting hevði við sær broyttan hugburð og minkandi undirtøku fyri likamligari revsing.

**Lógin sendir signal**
Og hon greiddi víðari frá, at samfelagið við slíkari lógarbroyting ger greitt, at likamlig revsing av børnum verður ikki góðtikin. Umframt at boða frá eini almennari støðu til málið við tí fyri eyga at minka um harðskap í uppalingini, hevði hetta styrkt um støðuna hjá starvsbólkum, sum hava við børn og foreldur at gera. Her verður hugsað um heilsusystrar, lærarar, pedagogar, sosialráðgevarar, læknar, løgreglu og onnur, sum við einum klárum rættargrundarlagi kundu sagt bæði børnum og vaksnum, at ikki er loyvt at sláa børn.

- Tí hvussu skal eitt nú ein lærari greiða einum barni frá, at tað ikki má sláa og vera harðligt, um so er, at hetta er vanliga talumálið í heiminum? Spurdi Katrin Dahl Jakobsen í uppskotinum í februar 2003.

Vit hava til fánýtis roynt at fingið eina viðmerking frá Jacob Vestergaard, landsstýrismanni í Innlendismálum, í morgun.

# Fegnast um at revsirætturin er avtikin

**Tað er ein grundleggjandi rættur hjá øllum børnum ikki at verða sligin, sigur Erika Hayfield, granskari innan barnamentan og nevndarlimur í Barnabata**



*Erika Anne Hayfield, granskari innan barnamentan og nevndarlimur í Barnabata, frøist um at revsirætturin er avtikin.*
*- Tað ber ikki til at skyna ímillum har›a og varliga likamliga revsing, tí hvar gongur markið? spyr hon.*

BØRN OG UNG
*Rigmor Dam*
*rigmor@sosialurin.fo*

Tað er ein stórur sigur fyri børnini, at revsirætturin nú er avtikin og at børnini kunnu finna vernd í lógini, sigur Erika Hayfield. Hon vísir á, at fyri tey í Barnabata er hetta enn ein orsøk til, at fara meira miðvíst út í samfelagið fyri á tann hátt at ávirka fólk til at hava størri virðing fyri børnum sum heild, sum hon tekur til.

- Eg eri skelkað av, hvussu lítla virðing børn hava í Føroyum, og hvussu lágan sosialan status tey hava. Tí kann hendan lógin senda eitt signal um, at børn hava eitt virði og at tey eisini hava ein rætt. Fyri meg hevur tað grundleggjandi týdning, hvønn hugburð politikarar hava til børn, og vón mín er, at hetta fær positiva ávirkan á hugburðin til børn sum heild. Valdsjavnvágin millum børn og vaksin her á landi er púra skeiv og børn verða sum heild als ikki tikin í álvara ella spurd eftir, sigur Erika Hayfield, sum tó ikki ivast í, at vit elska børn okkara líka nógv sum í øðrum londum.

**Negativar avleiðingar**
Í lesarabrævin um, sum hon setti í bløðini herfyri, greiddi hon eitt nú frá, at børn í ringasta føri beinleiðis kunnu koma likamliga til skaða av at verða sligin, og at likamlig revsing kann hava við sær sálarlig árin.

- Gransking hevur víst á, at likamliga revsing hevur negativa ávirkan á sálarstøðuna hjá barninum og á viðurskifti millum barn og foreldur. Eisini kann moralska menningin hjá barninum verða darvað, soleiðis at tey fáa størri trupulleikar at skyna millum rætt og rangt. Sambært gransking viðførir likamlig revsing harumframt, at børn verða meira vreið (aggressiv) og teirra atburður meira ósosialur. Sostatt má sigast, at likamlig revsing als ikki kann lýsast sum sakleys og óskaðilig, skrivaði hon tá.

**Vantandi virðing**
**Og hon sigur víðari, at:**
- Ofta verður tikið til, at børn verða likamliga revsað sum partur av uppalingini, og tí at foreldrini elska tey. Tó er veruleikin tann, at tá eitt barn verður likamliga revsað, er tað aloftast, tí at tann vaksni hevur mist tamarhald á sær sjálvum og/ella á støðuni. At revsa børn likamliga er ikki eitt tekin um kærleika, men eitt greitt tekin um vantandi virðing. Harumframt skulu vit gera okkum heilt greitt, at børn sum uppliva harðskap, eisini læra harðskap.